# Til læraran




Rithøvundur: Elin á Rógvi

Bókadeild Føroya Lærarafelags 2023

Nám: Asta Wolles, Gunvá Magnussen, Lis G. í Jákupsstovu og Marjun Ziskason

## Um bókina

*Flytifuglar* er um 11 ára gomul Mai, sum býr á Válinum. Mai kom sum smágenta til Føroyar at búgva, tí at mamma hennara giftist við vestmenninginum Jóannesi. Áðrenn Mai kom til Føroyar at búgva, búði hon hjá ommu og abba sínum í Tailandi, tí mamma hennara var farin til Danmarkar at arbeiða. Mai gongur í skúla í Vestmanna, í flokki við Emmu, sum er besta vinkona hennara. Mai kennir seg ofta øðrvísi, m.a. tí at mamman er tailendsk, og tailendska mentanin fyllir nokk so nógv hjá mammuni.

Tá ið eitt smábarn hvørvur í Vestmanna, ávirkar hetta alla bygdina ógvuliga nógv. Mai verður vavd inn í bæði eitt og annað í sambandi við horvna barnið. Jóannes er tíðindamaður og skrivar nógv um hendingina, og Emma er ógvuliga spent at kanna málið.

Elin á Rógvi hevur skrivað bókina *Flytifuglar*, sum upprunaliga varð skrivað til útvarpsleik í 2018, leikurin varð sendur sum jólakalendari sama árið.

Í útvarpsleikinum vóru tríggir sangir. Teir eru at finna á youtube og eita *Hevur tú tað betri nú*, *Fjøtraðir skuggar* og *Heima er saman við tær*. Sangirnir eru við í bókini sum yrkingar uttan heiti. Yrkingarnar eru á síðu 35, 41 – 42 og 128.

Uppgávurnar eru ætlaðar 4. – 6. flokki.

Gott hugskot er at hava eitt hefti at skriva í, tað kann gott vera heftið, sum næmingarnir annars brúka til føroyskt. Tey kunnu eisini gera eina mappu á telduni.

## Uppgávur og arbeiðsgongd

Bókin er í 17 pørtum. Í summum førum eru uppgávur til hvønn part sær, men viðhvørt eru uppgávurnar til fleiri partar, m.a. í byrjanini og endanum. Til ber eisini at lesa alla bókina og síðan arbeiða við uppgávunum.

Les síðu 7-10 fyri næmingunum. Gev næmingunum tveir gular seðlar í part at skriva síni git á. Tosið um, hvat næmingarnir hava gitt. Gulu seðlarnir verða klistraðir í heftið.

Lesið síðu 10-23 og arbeiðið so við spurningunum.

Tað er ymiskt, hvussu nógvar uppgávur eru til hvønn partin, og hvussu nógva tíð tað tekur at arbeiða við teimum. Mett verður, at 15 – 20 tímar kunnu setast av til undirvísingargongdina.

Tað er upp til hvønn einstakan lærara, hvussu arbeitt verður við uppgávunum, men viðhvørt hava vit skrivað, at næmingarnir arbeiða saman tveir og tveir og viðhvørt, at allur flokkurin arbeiðir saman.

*Til Jane*

Á síðu 5, áðrenn søgan byrjar stendur *Til Jane* og so eru orð skrivað í einum mynstri. Hetta kann vera ein yrking, og samsvar er næstan ímillum orðini og heitini á pørtunum. Tað kann verða áhugavert at arbeiða við orðunum sum einari yrking og hugleiða um tey.

Jane, sum verður umrødd, er úr Tailandi, men hevur búð í Føroyum í nógv ár. Jane hevur lisið *Flytifuglar*, áðrenn Elin gjørdi tilfarið til útvarpsleik og hevur vegleitt Elini í øllum, sum hevur við tailendsk viðurskifti í Føroyum at gera. Elin sigur, at hjálpin frá Jane hevur verið ógvuliga góð og gevandi.

© Nám

# Hugskot

Undir hugskot liggja nakrar eyka uppgávur, um tað er so, at tú hevur hug at geva næmingunum fleiri uppgávur enn tær, sum eru í næmingaheftinum. Onkrar av uppgávunum undir hugskot eru væl egnaðar til tvørgreinaligt arbeiði.

# Hasji

Á síðu 15 – 16 minnist Jóannes aftur á døgurðamatin, sum tey ótu, tá ið hann var barn. Hann nevnir m.a. hasji. Ein uppskrift er vegleiðandi tekstur og skal lesast á ávísan hátt. Í partinum *Orðafjas* í *Nem í sætta* verður arbeitt við ymiskum tekstsløgum. Á síðu 142 – 143 verður arbeitt við vegleiðandi teksti.

Tit kunnu gera 'hasji', sum tey gjørdu tað, tá ið Jóannes var barn.

- Vita tit, hvat 'hasji' er?
- Hyggið at uppskriftini.
- Hvussu kalla tit hendan rættin?

Uppgávan kann gerast í samstarvi við heimkunnleika.

© Nám



# Hasji

## Hasji til 4 fólk

### Tilfar

500 g av malnum oksakjøti
1 stóran leyk
1 purru
3 stórar gularøtur
50 g av tomatpuré
1 spsk av søtari kilisós
3 dl av køldum vatni

### Mannagongd

Sker leyk og purru smátt.
Rív gularøturnar fint.
Brúnka kjøtið sum ein stóran búff, og skil tað síðan sundur.
Leykur og purra verður latið í kjøtið, lat smákóka í 5 min.
Stoyt vatnið í.
Rivnu gularøturnar verða latnar í kjøtið saman við tomatpuré og søtari kilisós.
Kóka við lítlum hita í hálvan tíma.

Hav rís aftur við.







© Nám

## Ferðavinna

Í partinum Slangur á s. 28 – 29 verður tosað um, at grannahúsini hjá Mai verða útleigað. Mai prátar ofta við ferðafólkini. Her er høvi at draga evnið ferðavinna inn í undirvísingina. Til ber eisini at gera meira burturúr í samstarvi við støddfrøði, t.d. at gera stabbamyndir.

- Vitja nógv ferðafólk, har tú býrt?
- Hvussu eru gistingarmøguleikarnir? – hotel, airbnb, onnur útleigan, kampingøki, bátahavn?
- Tosar tú nakrantíð við ferðafólk?
- Hvat gera ferðafólkini, sum vitja, har sum tú býrt?
- Úr hvørjum londum eru ferðafólkini?
- Sig eitt sindur frá tínum upplivingum sum ferðafólk uttanlands ella í egnum landi.

## Saknur

Í partinum Horvið á síðu 40 – 41 stendur, at Mai saknar ommuna og abban í Tailandi. Hon ferðaðist einsamøll allan vegin úr Tailandi, tá ið hon kom til Føroyar.

- Hvussu man tað hava verið hjá Mai at fara frá ommuni og abbanum?
- Hví er abbin so stillur?
- Hví fær omman einki sagt?

Mai hevur ikki sæð ommuna og abban í fimm ár.

- Hvussu heldur tú, at tað man vera?

Skriva eina søgu, har tú svarar spurningunum. Minst til at brúka allar sansirnar, so søgan verður livandi. Lesið søgurnar fyri hvør øðrum.

## Gerið heimasíðu

Á s. 53 – 54 í partinum Trilla er eitt brot av heimasíðuni, sum Jóannes arbeiðir við. Flokkurin kann arbeiða við at gera heimasíðu. Tey fara í bólkar, og hvør bólkur fær sína uppgávu:

- Gerið heimasíðu. Í *Nem í fjórða*, á síðu 122-123, verður arbeitt við at gera eina heimasíðu, har er eisini ein filmsvegleiðing.
- Skrivið tíðindi at leggja á heimasíðuna.
- Takið myndir at leggja á heimasíðuna.
- Takið upp samrøður og leggja út á heimasíðuna.
- Gerið eina undirsíðu, sum eitur *Flytifuglar*.
- Leggið eisini tilfarið, sum tit hava gjørt til hinar partarnar, á undirsíðuna.

- Kannið heimasíðuna. Eru tit nøgd við hana ella kann okkurt gerast betri?
- Snøggið hana, um tørvur er á tí.

© Nám

## Dreymafangarar

Í partinum Pitsa á síðu 72 – 73 sigur Oda Mai søguna um, hví báturin eitur Dreamcatcher.
Tit kunnu gera dreymafangarar. Uppgávurnar kunnu gerast í tvørgreinaligum samstarvi við handarbeið og evning.
Uppskriftirnar til ymsu dreymafangararnar hevur Tóra Joensen gjørt.

- Kenna tit dreymafangarar?
- Vistu tit av, at indianar hava dreymafangarar á líknandi hátt, sum kristin hava verndareinglar?
- Kunnu vit samanbera dreymafangarar og verndareinglar?
- Tosið um hetta í flokkinum.

Perla ein dreymafangara



**Tilfar**

- Ein rundur perluformur
- Perlur í ymiskum litum
- Tráður
- Band
- Prýðisperlur
- Fjaðrar í ymiskum litum
- Límrevolvari
- 1 ark av bakipappíri
- Strúkibretti og strúkijarn



© Nám

## Mannagongd



1. Perla ein ring við 4 røðum
2. Perla eitt mynstur innan í



3. Strúk perlurnar



4. Perla ein lítlan runding í miðjuna
5. Strúk perlurnar



6. Seyma minna rundingin saman við størra rundingin, soleiðis at tað eru umleið 4 cm millum.



7. Bint 3 bond, umleið 12 cm hvørt, fast í rundingin umleið 4 cm millum hvørt og seyma ella knýt perlurnar í bandið. Líma fjaðrarnar á bondini.

© Nám

# Svartur og hvítur dreymafangari



Tilfar

- Ein metalringur
- Tráður
- Prýðisperlur (metal, svartar og klárar)
- Fjaðrar (hvítar og svartar)
- Límrevolvari
- Tógv at vinda um metalringin (svart)
- Tógv til lokkanetið (svart bummul)



© Nám

## Mannagongd

1. Vint tógv runt um allan ringin, eitt sindur fast og tætt, so hann ikki sæst. Fest tógvið (endan) við at seyma ella líma hann fastan.





2. Nú fara vit at gera lokkanet innan í ringinum. Um perlur skulu vera í lokkanetinum, drag so perlurnar á tráðin, tá tú ert komin har til, sum perlurnar skulu vera og bint ein knút á, so perlan situr føst.









3. Nú fara vit at gera endarnar, sum hanga niður úr ringinum. Klipp 5 træðrir (2 træðrir á 5 cm, 2 træðrir á 9 cm, 1 tráð á 11 cm), ella so langar sum teir skulu vera. Drag ymiskar prýðisperlur á tógvið og bint endan fastan á ringin, soleiðis at tann fyrsti endin verður bundin beint á miðjuna á ringinum. Hinir 4 endarnir skulu hanga umleið 3-4 cm frá miðjuni, til vinstru síðu og til høgru síðu. Líma ella bint fjaðrarnar á endarnar.
4. Til seinast klippa vit ein enda, 30 cm ella so langan sum hann skal vera, at heingja dreymafangaran upp við. Her kunnu eisini perlur dragast á.

© Nám

# Litfagur dreymafangari





**Tilfar**

- Papp av pappeskju, umleið 25x25 cm
- 1 tallerk, umleið 20 cm í tvørmáti
- 1 tallerk, umleið 16 cm í tvørmáti
- Tráður
- Prýðisperlur
- Fjaðrar í ymiskum litum
- Límrevolvari
- Tógv at vinda um pappringin og til lokkanetið

© Nám

## Mannagongd



1. Fyrst fara vit at gera pappringin. Legg tann størra tallerkin á pappírið og tekna fram við kantinum, so tað verður ein ringur.



2. Legg tann minna tallerkin inn í ringin og tekna fram við kantinum, so tað verður ein minni ringur.
3. Sker ella klipp eftir linjunum (á ringunum).



4. Vint tógv runt um allan ringin eitt sindur fast og tætt, so at pappírið ikki sæst. Fest tráðin (endan) við at seyma ella líma hann fastan.





5. Nú fara vit at gera lokkanetið innan í ringinum. Um perlur skulu vera í lokkanetinum, drag so perlurnar á tógvið, tá tú ert komin har til, sum perlurnar skulu vera og bint ein knút á, so perlan situr føst.
6. Nú fara vit at gera endarnar, sum hanga niður úr ringinum. Klipp 3 træðrir á umleið 24 cm, ella so langar sum teir skulu vera. Drag ymiskar prýðisperlur á tógvið og bregda endan um ringin soleiðis, at annar endin hongur longur niður.



7. Tann fyrsti endin skal bregdast beint á miðjuna á ringinum. Hinir báðir endarnir skulu hanga umleið 5-6 cm frá miðjuni, ein til vinstru síðu og hin til høgru síðu. Líma fjaðrar í ymiskum litum á endarnar.



8. Til seinast klippa vit ein enda, 30 cm ella so langan sum hann skal vera, at heingja dreymafangaran upp við. Her kunnu eisini perlur dragast á.

© Nám

## Sangløta

Í partinum Lurta á síðu 83 – 85 verður skipað fyri sangløtu fyri Olivuri. Eitt hugskot er møguliga, í samstarvi við tónleikalæraran, at skipa fyri einari sangløtu. Eru næmingar, sum duga at spæla á ljóðføri og tíma væl at syngja, so kunnu teir framføra.

- Ímyndið tykkum, at tit skulu vera við at skipa fyri eini sangløtu.
- Hvørjar sangir høvdu tit valt?

## Ymisleiki, Snapp síða 52

"Løgið, tá hon jú fegin vil, at mamman skal halda hana vera "góða", at tær eru góðar við hvørja aðra. Hon vil fegin … Hon ynskir sær at vera lítil aftur … At tann vakra, smílandi mamman, sum hon longdist so illa eftir, tá hon búði hjá ommuni, fór at koma aftur. Koma rennandi, bera eyga við hana og taka um hana og halda henni fast og leingi.
Hendan dagførda útgávan av mammuni samsvarar illa við myndina av mammuni, sum Mai hevði roynt at hildið fastari, tá henni longdist eftir henni í Tailandi. Tann mamman, sum Mai hevði longst eftir, var mild og blíð. Mamman smíltist ikki longur, sum hon gjørdi í Tailandi. Mai minnist, hvussu øll hugdu at henni og vildu práta við hana. Nú er hon so køld … Tað er sjáldan, at hon smílist til Mai ið hvussu er, hon angrar helst, at hon tók hana til Føroya. Men hon strálar heldur ikki, tá ið hon gongur úti, sum hon gjørdi í Tailandi. Hon er næstan ósjónlig …"

- Hvussu ber tað til, at mamma Mai ikki er tann sama í Tailandi og í Føroyum?
- Man Mai vera tann sama í Føroyum, sum hon var í Tailandi?
- Ber til at liva á sama hátt í tveimum londum, sum eru so ymisk og hava so ymiska mentan?
- Hvat kann vera orsøkin til, at Mai upplivir mammuna so ymiska í hesum báðum londunum?
- Hugleið saman við einum makkara, áðrenn tit tosa saman um hetta í flokkinum.

## Heima er saman við tær, Saman við tær síða 128

Bókin endar við einari yrking.

Øll ørindini byrja við *heima er* ... Hví man tað vera?
Kenna tit nakað aftur av tí, sum yrkjarin sigur vera *heima er*...? Hvat?

## Sosialir miðlar

Gerið eina kanning, har tit spyrja umleið líka nógvar dreingir og gentur í miðdeildini um, hvat teimum dámar best av ymsum sosialum miðlum, t.e. Snapchat, Facebook, Instagram, Whatsapp, Discord, YouTube ella onkrum øðrum.
Gerið eitt spurnarblað, har tit spyrja um aldur og kyn. Tit kunnu fáa tey at geva miðlunum karakter frá 1 til 3, har 1 er tann miðilin, teimum dámar best. Ein annar møguleiki er, at tey skulu svara JA ella NEI. (Sí dømi niðanfyri)
Tá ið tit eru liðug at gera kanningina, skulu tit seta úrslitini í talvur, tekna stabbamyndir og tosa um kanningina í felag.
Er munur á, hvørjar sosialar miðlar, gentur og dreingir brúka?
a. Hvønn sosialan miðil dámar gentum best?
b. Hvønn miðil dámar dreingjum best?

© Nám

c. Er onkur sosialur miðil, sum gentum og dreingjum dámar líka væl?
d. Hvør sosialur miðil er best dámdur millum gentur og dreingir til samans?
e. Hvør sosialur miðil er verst dámdur millum gentur og dreingir til samans?
Hyggið at aldursbýti í mun til, hvørjar sosialar miðlar, næmingarnir brúka.
a. Hvønn sosialan miðið dámar børnum í 4. flokki best/verst?
b. Hvønn miðil dámar børnum í 5. flokki best/verst?
c. Hvønn miðil dámar børnum í 6. flokki best/verst?
d. Er onkur sosialur miðil, sum øllum í miðdeildini dámar líka væl?

| Sosialar miðlar | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | 🙂 | 😐 | 🙁 | Gentur | Dreingir |
| Snapchat | | | | | |
| Facebook | | | | | |
| Instagram | | | | | |

## Snapchat

| Sosialar miðlar | Teljing | Tal |
|---|---|---|
| Snapchat | 卌 卌 卌 // | 17 |
| Facebook | 卌 卌 /// | 13 |
| Instagram | 卌 / | |

Á síðu 44 sigur Jóannes, at hann má skunda sær at kanna málið nærri, hann má fáa søguna á heimasíðuna. Eingin annar hevur hesa søguna - hann má vera fyrstur.

- Hví hevur tað so nógv at siga fyri Jóannes, at hann fær lagt søguna á heimasíðuna, og at hann er fyrstur við søguni?

Jóannes nevnir, at har eru yvir 9000 klikk longu.

- Hví hevur tað so nógv at siga? Tosið saman í flokkinum.

© Nám

Talva til uppgávuna Tilknýti

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Eg eri fødd/ur | | Eg búgvi | | Eg havi búð | |
| Mamma er fødd | | Mamma býr | | Mamma hevur búð | |
| Pápi er føddur | | Pápi býr | | Pápi hevur búð | |
| Omma er fødd | | Omma býr | | Omma hevur búð | |
| Abbi er føddur | | Abbi býr | | Abbi hevur búð | |
| Omma er fødd | | Omma býr | | Omma hevur búð | |
| Abbi er føddur | | Abbi býr | | Abbi hevur búð | |

© Nám